**Dagur:** 16. november 2012
**J.nr.:** 12/00135-1
**Málsviðgerð:** Andras Mortensen

# Søvn Landsins, ársfrágreiðing 2011

## Innihald


Søvn Landsins, ársfrágreiðing 2011 ........ 1
Søvn Landsins ........ 3
Landsbókasavnið ........ 4
Endamál og uppgávur ........ 4
Virksemi og tænastur ........ 5
Bókastovnurin ........ 6
Vísindabókasavn ........ 6
Tjóðbókasavn ........ 7
Bókaútgávan 2011 ........ 7
Annað ........ 7
Landsskjalasavnið ........ 8
Bakgrund – søgulig menning ........ 9
Hølisviðurskifti – skrivstovur og goymslur ........ 10
Skjalasøvn, skráseting og avhending ........ 10
Miðling ........ 11
Eftirlit og góðkenning ........ 13
Gransking, altjóða samstarv v.m. ........ 14
Fornminnissavnið ........ 14
Endamál og uppgávur ........ 14
Antikvariskt virksemi ........ 15
Musealt virksemi ........ 17
Náttúrugripasavnið ........ 18
Framsýningar ........ 19
Gransking á djóra- og plantudeildini ........ 19



Faroe Islands National Heritage. Archives, Library and Museums
Kúrdalsvegur 15 · P.O. Box 1155 · FO-110 Tórshavn Tel. +298 340 500
savn@savn.fo · www.savn.fo

Verkætlanir ... 20
Miðlan ... 21
Útgávur ... 21
Tiltøk og vitjanir ... 23
Luttøka á fundum uttanlanda ... 23
Umsiting  og ráðgeving ... 23
Havlívfrøðilig Royndarstøð ... 24

Søvn Landsins
*Faroe Islands National Heritage. Archives, Library and Museums*
Kúrdalsvegur 15 · P.O. Box 1155 · FO-110 Tórshavn Tel. +298 340 500
savn@savn.fo · www.savn.fo

# Søvn Landsins

1. januar 2011 vóru Landsbókasavnið (stovnað í 1828, undir heimastýrið í 1952), Landsskjalasavnið (stovnað 1932, undir heimastýrið í 1952), Náttúrugripasavnið (stovnað í 1955), Havlívfrøðiliga Royndarstøðin (2007) og Fornminnissavnið (stovnað í 1898, undir heimastýrið í 1952) løgd saman í nýggja stovnin Søvn Landsins. Endamálið við samanleggingini var at rationalisera fyrisiting og skapa betri møguleikar fyri fakligari menning innan verandi fíggjarkarmar.

Sambært avgerð hjá landsstýrismanninum frá 15. november 2010 eru heimildir og uppgávur hjá Søvnum Landsins tær somu sum eru skipaðar í galdandi lógum á bókasavns-, skjalasavns- og museumsøkinum. Teir gomlu stovnarnir eru soleiðis deildir í tí samanlagda stovninum. Stjórin fyri samanlagda stovnin varðar eisini av størvunum sum landsbókavørður, landsskjalavørður og landsantikvarur. Á donskum verða Søvn Landsins nevnd “Færøernes Natur- og Kulturarv, Arkiver, Biblioteker og Museer” og á enskum “Faroe Islands National Heritage, Archives, Libraries and Museums”.

Uppgávurnar hjá Landsbókasavninum er at vera landsbókasavn, bókasavnssentarlur og bókasavnseftirlit. Landsbókasavnið skal savna allar føroyskar bókmentir og í tann mun tað er gjørligt allar bókmentir, sum viðvíkja Føroyum. Harumframt skal Landsbókasavnið sum sentral- og granskingarbókasavn *virka fyri útbreiðslu av kunnleika og upplýsing í landinum*. Landsbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum, tekur sær m.a. av bókakeypi og katalogisering til bókasøvn, sum ikki sjálvi hava útbúgvið fólk til hetta. Landsbókasavnið umsitur skylduavhendingina av prentlutum, sum er áløgd teimum, ið framleiða eintøk til útgávu.

Landsskjalasavnið hevur tvær høvuðsuppgávur, at innsavna, skipa, varðveita, lýsa og taka sær av tí tilfari, sum almennir stovnar sambært lóggávu skulu avhenda til savnið, og at hava eftirlit við journalum og arkivum hjá almennum stovnum og ráðgeva teimum. Seinna uppgávan er fyritreyt fyri tí fyrru. Landsskjalasavnið skal harumframt innsavna privat skjøl, sum hava granskingarligan ella mentanarligan týdning. Samstundis er tað uppgáva Landsskjalasavnsins at hava savnindi tøk til almenna fyrisiting og gransking og at hava egna gransking. Landsskjalasavnið samstarvar við útlendsk skjalasøvn, serliga Statens Arkiver í Danmark, sum eisini hava týðandi savnindi úr Føroyum. Landsskjalasavnið og Statens Arkiver samstarva um afturbering av føroyskum skjalasavnindum úr Danmark til Føroya so hvørt.

Høvuðsuppgávurnar hjá Føroya Fornminnissavni, Føroya Náttúrugripasavni og Havlívfrøðiligu Royndarstøðini, sum lutvíst hevur inntøkufíggjað virksemi, er at reka musealt virksemi, nevniliga innsavning, skráseting, varðveiting, gransking og miðlan av lívfrøðiliga náttúruarvi og fysiska mentanararvi Føroya. Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið eru umboðað í Yvirfriðingarnevndini. Harumframt umfata uppgávur Fornminnissavnins umsiting av fornminna- og bygningafriðingarlógini, lógini um fornminni í sjónum, fakligt eftirlit við mentanarsøguligum bygdasøvnum og antikvariskari ráðgeving í sambandi við bygningar fólkakirkjunnar.

Søvn Landsins høvdu í 2011 eina samlaða játtan upp á kr. 35,9 mió, av teimum 62% til rakstur, 10% til aktikvariskar verkætlanir og 28% til ymiskar stuðils- og eftirlitsskipanir, sum stovnurin fyrisitur. Í 2011 fevndu hesar um 21 bygdasøvn við mentanarsøguligum virksemi, 20 fólka- og skúlabókasøvn og 3. listasøguligar samlingar.

Søvn Landsins
*Faroe Islands National Heritage. Archives, Library and Museums*
Kúrdalsvegur 15 · P.O. Box 1155 · FO-110 Tórshavn Tel. +298 340 500
savn@savn.fo · www.savn.fo

Fyrsta árið í samskipanini av Søvnum Landsins hevur verið merkt av at byggja upp eitt felags undirstøðukervi innan KT og samskifti. Málið varð rokkið við árslok, og farið er nú í gongd við tær næstu stóru avbjóðinginar, sum er at orða strategiir fyri føroyskan mentanar- og náttúruarv. Mentamálaráðið hevur stungið út í kortið gerð av nýggjari museumslóg og nýggjari lóg fyri bygningafriðing og fornminnavernd. Eisini er í samstarvi við stiftsmyndugleigarnar farið undir at gera skipanir fyri varðveiting av teimum eldru kirkjunum í Føroyum. Nakrar av teimum eru friðaðar eftir løgtingslóg um bygningafriðing ímeðan aðrar verða varðveittar sambært danskari lóggávu, sum er skipað sum lóg í Føroyum.

Eisini á bókasavnsøkinum og skjalasavnsøkinum er í ávísan mun tørvur á lógarbroytingum, serliga við atliti at talgildari varðveiting, men eisini á øðrum økjum so sum stuðulsskipanum og líknandi.

## *Landsbókasavnið*

Bókastovnurin er umleið 160.000 bind, av teimum umleið 24.000 í Vísindadeildini og Føroyadeild. Bókasavnið hevur harumframt tíðarrit og mikrofilm av serliga føroyskum bløðum. Eisini heldur bókasavnið elektroniskar tænastur, har høvuðsparturin er vísindalig tíðarrit. Í 2011 hevði Landsbókasavnið umleið 23.000 útlán, íroknað greinir úr tíðarritum og niðurtøka av elektroniskum greinum. Hartil kemur nýtsla av Føroyadeild, sum hevur bøkur, handrit, stubbar, gramofonplátur, kassettubond og annað.

### Endamál og uppgávur

Í lógini um bókasøvn stendur, at bókasøvn hava til endamáls at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi.

Bókasavnsskipanin eru bókasøvnini og tær tænastur, sum hesi søvnini veita borgarum og stovnum. Bókasøvnini eru fyrst og fremst fólkabókasøvnini, skúlabókasøvnini í fólkaskúlanum og í vinnu- og miðnámsskúlum og so tey í hægri undirvísingarstovnum og stovnsbókasøvnini.

Til at veita sínar tænastur kunnu bókasøvnini hava til taks bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur, sjónbond, fløgur og annað hóskandi tilfar, sum eisini kann fevna um tónleik og teldutøkt tilfar, sum til dømis internet og margmiðlar. Tilfarið verður lænt út uttan viðurgjald, og tað skal umboða dygd og fjølbroytni og vera tíðarbært.

Landsbókasavnið er høvuðsbókasavn og hevur harumframt eisini týðandi uppgávuna at vera tjóð- og vísindabókasavn. Landsbókasavnið hevur m.a. til endamáls

- at savna, skráseta og varðveita allar føroyskar bókmentir og alt, sum er skrivað av bókmentum um Føroyar og av føroyingum
- at hava eina handritadeild við handritum o.ø. eftir føroyskar høvundar og handritum, ið annars lýsa føroyska bókmentasøgu, mentan og siðsøgu
- at skipa fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni

Søvn Landsins
*Faroe Islands National Heritage. Archives, Library and Museums*
Kúrdalsvegur 15 · P.O. Box 1155 · FO-110 Tórshavn Tel. +298 340 500
savn@savn.fo · www.savn.fo

- at vera føroysk ISBN-, ISMN- og ISSN-skrivstova
- at skipa fyri gransking í tí tilfari, sum er til skjals á stovninum

Yvirskipaðu arbeiðsøkini eru umsiting av bóka- og tilfarsstovni, skráseting/flokking, varðveitsla og miðling.

Landsbókasavnið skipar eisini fyri klárgering av bókasavnstilfari til útivið 20 fólka- og skúlabókasøvn og samstarvar eisini við aðrar stovnar um veiting av vísindabókasavnstænastu.

Avtala er við Fróðskaparsetrið um, at Landsbókasavnið veitir stovninum vanliga bókasavnstænastu.
Við ársbyrjan í fjør varð Landsbókasavnið lagt saman við øðrum søvnum í nýggja stovnin Søvn Landsins. Fyri Landsbókasavnið skal hetta merkja, at arbeiðsorkan á staðnum nú fyri tað mesta skal fara til bókasavnsfakligt arbeiði og í minni mun til at røkja ta bókasavnsumsiting, sum er ásett í bókasavnslógini. Umsitingin fevnir umframt fyrisiting um m.a. býtið av árliga bókasavnsgjaldinum til rithøvundar og studningin til kommunur til bókasavnsvirksemi o.a.

Landsbókasavnið hevur sambært lógini eisini eftirlit við fólkabókasøvnunum og skal veita ráð og leiðbeining.

Tann fyrsta tíðin eftir samanleggingina hevur verið ein tilgongd við eini tillaging til broyttu stovnsskipanina. Ein liður í hesi tillaging er, at Landsbókasavnið má gera eitt neyvari uppgávu- og ábyrgdarbýti fyri virksemið og uppgávurnar, savnið skal loysa.

Erhard Jacobsen varð í fjør settur sum leiðari á Landsbókasavninum og tók við starvinum 1. februar 2011. Stutt eftir varð Annika Smith sett í starv sum 1. bókavørður. Umroknað til fulltíðarstørv starvaðust við ársenda 2011 beint undir 13 fólk á Landsbókasavninum, og er hetta munandi færri starvsfólk enn undanfarin ár.

## Virksemi og tænastur

Landsbókasavnið fekk umleið 3.600 fyrispurningar í 2011. Av hesum vórðu 2/3 avgreiddir við bókavarðaborðið í útláninum og restin um telefon ella við telduposti. Fyrispurningarnir kunnu vera rættiliga ymiskir, og summir kunnu avgreiðast á staðnum, meðan aðrir kunnu taka longri tíð at avgreiða. Í fjør vórðu umleið 23.000 bøkur og annað tilfar lænt á Landsbókasavninum, og hetta er ein øking samanborið við árið fyri. Ein partur av hesum eru bøkur ella tilfar, sum vegna lánaran er bílagt frá øðrum bókasøvnum í Føroyum og frá útlendskum bókasøvnum. Her eru eisini taldar við vísindaligar greinir, sum verða tiknar niður úr on-line tíðarritsgrunnum, sum Landsbókasavnið heldur saman við øðrum granskingar- og útbúgvingarstovnum (E-feingi). Landsbókasavnið bíleggur harumframt vegna lánarar ein hóp av greinum frá útlendskum bókasøvnum. Talan er í flestu førum um greinir við fakligum ella vísindaligum innihaldi. Flestu útlánini eru í januar-juni og oktober-desember.

Nógv koma eisini inn á gólvið at lesa og arbeiða og lesa nýggj og gomul bløð, og vitjandi á

Landsbókasavninum læna eisini fitt av tilfari úr Føroyadeild og Handritadeildini til nýtslu á staðnum. Landsbókasavnið hevur ikki tøl fyri, hvussu nógv fólk vitja bókasavnið.
Landsbókasavnið skipar eftir umbøn fyri bókasavnskunning fyri skúlaflokkum - serliga úr miðnámsskúlum - ella fyri lesandi.

Søvnini í Søvn Landsins hava felags heimasíðu (savn.fo), sum eisini vísir til egnu heimasíðurnar hjá søvnunum. Heimasíðan hjá Landsbókasavninum (flb.fo) verður væl vitjað. Í 2011 vitjaðu 21.825 fólk heimasíðuna 46.589 ferðir, og tey lótu í miðal upp 3,84 síður við hvørja vitjan ella 179.000 síður íalt. Til ber at leita eftir, bíleggja og endurnýggja tilfar á bókasøvnunum á heimasíðuni bókasøvn.fo (bokasavn.fo).

## Bókastovnurin

Landsbókasavnið hevur  ein hampuliga stóran bókastovn. Í Útláninum eru 37.704 bind, í Vísindadeildini 5.760 og á Lesistovuni 3.174. Í Føroyadeildini eru 18.856 skrásettar eindir, og á goymslu eru 26.930 bind. Hetta er íalt 92.424 titlar ella góð 164.000 eintøk.

Harumframt eru skrásettir 540 handritapakkar.

Tey 17 fólkabókasøvnini áttu við ársenda 302.410 bøkur. Útlánið í 2011 var íalt 162.108 bøkur, og er hetta ein øking á 10% síðan 2009.

## Vísindabókasavn

E-feingi (flb.fo/efeingi), sum er ein tænasta, ið fevnir um on-line atgongd til vísindaligar leitigrunnar, e-bøkur og stór greinasøvn og tíðarrit, verður umsitið av Landsbókasavninum.

Slíkar tænastur sum henda verða veittar á øllum størri bókasøvnum og útbúgvingarstovnum uttanlands og eisini her hjá okkum, og hetta skal tryggja, at lesandi, lærarar, frøðingar, granskarar o.o. lættliga skulu kunna sleppa til eitt fjølbroytt vísindaligt dygdartilfar á netinum.

Okkara tænasta verður brúkt, men kanska ikki í nóg stóran mun. Landsbókasavnið fer tí at leggja enn meiri dent á at hava skeið og kunning í at brúka hesa tænastu. Royndir bæði uttanlands og her hjá okkum hava víst, at fólk skulu venja seg við at brúka vísindabókasavnstænastur, og hesar tænastur skulu marknaðarførast væl, skulu tær muna.

Vísindabókasavn verður annars umrøtt í álitinum *Vitan og vøkstur*, sum snýr seg um almenna granskingarpolitikkin. Í álitinum verður m.a. sagt, at “Granskingarpolitikkurin er samtyktur av Vísindaráðnum á fundi 28. januar 2011. Hann er galdandi fyri tíðarskeiðið 2011-2015. Tað er neyðugt at gera íløgur í felags infrakervi, sum alt granskingarumhvørvið skal kunna nýta uttan meirkostnað. Hetta er m.a. eitt sterkt universitets- og granskingarbókasavn, sum skal kunna veita atgongd til e-tíðarrit, bøkur og annað tilfar.”

Landsbókasavnið umsitur eisini EBI (flb.fo/ebi), sum er eitt samstarv millum fólka- & skúlabókasøvn og skúlar um felags hald av elektroniskum bókasavnstænastum á internetinum. Undirtøkan fyri hesi

tænastu hevur ikki verið so stór, sum ynskiligt kundi verið, og hon verður tí endurskoðað og væntandi broytt.

## Tjóðbókasavn

Landsbókasavnið hevur sum eina av sínum høvuðsuppgávum at savna og skráseta allar føroyskar bókmentir. Við lógarásettu skylduavhendingini er ásett, at av øllum verkum, útgivnum í Føroyum, skulu avhendast 4 ókeypis eintøk til Landsbókasavnið. Umframt at vera partur av støðinum undir okkara felags tjóðminnum, tað sum vit rópa Føroyadeild, so skal skylduavhendingin eisini tryggja støðið undir tjóðbókaskránni.

Tjóðbókaskráin skal koma øllum teimum, sum fylgja við útgávuvirkseminum, og teimum, ið fáast við at lesa og granska føroyskar bókmentir, til góðar.

Lat tað vera greitt, at uppgávan at skráseta føroyskar bókmentir er fjøltáttað arbeiði. Hetta er ikki minst galdandi, um vit eisini skulu hugsa um at savna og skráseta útgávur av føroyskum tónleiki umframt skráseting av øllum tí, sum nú verður givið út á netinum. Aftur at hesum kemur so stóra uppgávan at skráseta innihaldið í føroyskum bløðum, tíðarritum, bókum og elektroniskum útgávum.
Ikki fyrr enn vit gera alt hetta arbeiðið til lítar, kunnu vit siga, at vit eru komin á mál við tjóðbókaskránni. Og tað er fongur í slíkum skráum sum hesum, og tað munnu bæði vanligi lesarin, lærarar, skúlanæmingar, lesandi og granskarar longu hava sannað.

Flestu bókasøvnini - tó ikki Býarbókasavnið og skúlabókasøvnini í Havn - brúka bókasavnsskipanina Aleph til skráseting, leiting og útlán av bókasavnstilfari. Ein av komandi uppgávunum verður at dagføra felags bókasavnsskipanina, so at hon verður víðkað við nýggjum tilfari og gerst lættari at brúka.

## Bókaútgávan 2011

Sambært skrásetingini í Føroyska Bókalistanum komu 243 bøkur út í 2011. Hetta er nakað fleiri enn í 2010, tá ið 218 bøkur komu út. Upprunaverkini vóru 131 (2010:133), 28 fagurbókmentir, 62 yrkisbókmentir, 28 lærubøkur og 13 barnabøkur. Týðingarnar vóru 112 (2010:85), 19 fagurbókmentir, 7 yrkisbókmentir, 4 lærubøkur og 82 barnabøkur. Av barnabókunum vóru 24 týddar úr enskum, 21 úr donskum, 10 úr svenskum, 8 úr norskum og 19 úr øðrum málum.

Tað er vert at nevna, at 10 føroyskar e-bøkur eru skrásettar í Føroyska Bókalistanum í 2011, og er hetta fyrstu ferð, at tað er hent.

Tað komu eisini 32 ljóðbøkur út í fjør og umleið 44 tíðarrit og árbøkur.

## Annað

Landsbókasavnið hátíðarhelt tveir 70 ára føðingardagar hjá kendum føroyskum rithøvundum í fjør. 12. september 2011 fylti rithøvundurin Gunnar Hoydal 70 ár, og hátíðarhald var sama kvøldið.

2. november skipaði Landsbókasavnið fyri hátíðarhaldi fyri rithøvundinum Oddvør Johansen, sum fylti 70 ár 30. oktober. Bæði kvøldini vórðu væl vitjað.

Landsbókasavnið samskipaði Norðurlendsku bókasavnsvikuna í november í fjør. Hesaferð var evnið ‘Humor í Norðurlondum’. Vikan hepnaðist væl og fekk góða undirtøku.

Beint undan ársskiftinum fekk Landsbókasavnið tráðleyst netsamband í útláninum og á lesistovuni, so nú ber til at sita á savninum og arbeiða við egnari teldu við sambandi til internetið.

Laura Vinther, bókavørður, umboðar Landsbókasavnið í Ljóðbókanevndini. Landsbókasavnið umsitur eisini heimasíðuna hjá Ljóðbókanevndini (ljodbokur.fo).

Erhard Jacobsen luttók á altjóða stevnuni Next Library í Århus 19.-21. juni 2011. Á hesi áhugaverdu stevnu vórðu framtíðar útlitini hjá bókasøvnunum umrødd í norðurlendskum og altjóða høpi.
Hann var eisini saman við Martin Næs, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, á norðurlendskari ráðstevnu við heitinum Future Library í Helsinki 13.-15. oktober 2011. Í framløgu *Bibliotekers værdi i fremtiden* greiddi Erhard Jacobsen frá, at føroysk fólkabókasøvn sum heild ikki verða so nógv brúkt, sum bókasøvnini í okkara grannalondum. Hann metti, at hetta komst av, at fólkabókasøvnini ofta eru ov smá, ov lítið sjónlig, og at tey flestu ikki hava starvsfólk, sum eru fólkabókavørðir. Tað er eisini vert at minna á, at kanningar í okkara grannalondum og øðrum londum hava avdúkað, at tað ber til at vísa á beinleiðis samfelagsligan vinning av at hava góð bókasøvn, bæði fólka-, stovns- og fakbókasøvn. Treytin fyri at fáa vinningin er tó, at bókasavnsskipanin er væl útbygd, og at bæði einstaklingar og samfelagið virðismeta bókasøvnini og brúka tey.

Landsbókasavnið hevur í fleiri ár verið við í felagnum NordINFOLIT, sum er norðurlendskt samstarv um at virka fyri kunning um menning av kunningarførleikum (information literacy). Í løtuni er ivasamt, um hetta samstarvið heldur fram, men ætlanin er kortini at hava eina sonevnda Creating Knowledge-ráðstevnu í Svøríki í 2013.

Tíðarrit.fo (tidarrit.fo) er eitt talgilt bókasavn, har atgongd er til fleiri túsund talgildar blaðsíður av prentaða mentanararvinum, ið er varðveittur í bløðum og tíðarritum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Verkætlanin er eitt samstarv millum Grønlendska Landsbókasavnið, Landsbókasafn Íslands – Háskólabókasafn og Føroya Landsbókasavn. Sum er eru 21 føroysk tíðarrit talgild í Tíðarrit.fo.

## *Landsskjalasavnið*

Føroya Landsskjalasavn hevur til endamáls at tryggja varðveitingina av savnindum og skjølum, ið hava søguligt virði ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar. Landsskjalasavnið skal syrgja fyri at varðveittu savnindini altíð eru tøk hjá myndugleikum og almenningi. Landsskjalasavnið ansar eisini eftir, at umsitingarligar skrásetingarskipanir og skjalagoymslur hjá almennum myndugleikum eru tryggar og lúka tær treytir, sum eru settar í lógum og fyriskipanum.

## Bakgrund – søgulig menning

Tað sigst, at Landsskjalasavnið hevur røtur aftur til 1859, tá Leigubúðin í Tinganesi varð innrættað til skjalagoymslu hjá landsins myndugleikum. Óansæð hvussu, so endaði við at flest øll skjøl í føroysku (ríkis-)fyrisitingini, síðst í 19. øld vórðu send til Danmarkar í varðveitslu, tí at mett var at tey ikki vóru nóg væl vard í Føroyum. Eftir fyrra heimsbardaga varð umhugsað at byggja skjalasavn í Føroyum, og í 1932 hendi so, at Landsskjalasavn varð sett á stovn. Í tí sambandi vóru flest øll skjøl, ið áður vóru farin til Danmarkar, latin aftur til Landsskjalasavnið at varðveita.

Í 1952, 20 ár eftir at skjalasavnið varð sett á stovn, varð økið yvirtikið. Danska forsætismálaráðið og landsstýrið gjørdu í 1990 avtalu, um treytirnar fyri avhending til Landsskjalasavnið av 'ríkisskjølum', framleidd í Føroyum. Í 1992 kom lóg um Landsskjalasavn og í 1995 kom kunngerð um almenn savnindi og virksemið hjá Landskjalasavninum. Hesar báðar, lóg og kunngerð, lýsa endamálið við Landsskjalasavninum og virksemi tess og greina, hvat myndugleikaøki Landsskjalasavnsins umfatar, m.a. at Landsskjalasavnið hevur eftirlit við almennum myndugleikum og ráðgevur teimum. Í 2007 gjørdi Landsskjalasavnið, saman við Statens Arkiver í Danmark, upprit um 'afturbering' av skjølum liðugt.[1] Hetta upprit varð góðtikið av Mentamálaráðnum og danska Kulturministeriet, og fyrsta afturberingin til Landsskjalasavnið hendi sama ár.[2] Í 2010 gjørdu gjørdi Landsskjalasavnið reglur fyri vraking av almennum savnindum, sum greiðir frá, eftir hvørjum reglum almennir myndugleikar skulu vraka í teirra pappírssavnindum.

Síðani 2003 hevur Landsskjalasavnið lagt dent á at gera innihaldsligar og bygnaðarligar broytingar.[3] Fyrst varð størri dentur lagdur á miðling, við serligum miðlingartiltøkum og miðvísari menning av talgildu umsitingini.[4] Síðani fór Landsskjalasavnið í 2006 undir eitt meira skipað eftirlit við almennum myndugleikum, fyri at halda eygað við skrásetingum (journal- og fakskipanum) og goymslum teirra.[5]

---

[1] Uppritið vísir til karmarnar fyri, hvussu skjøl og savnindi, ið snúgva seg um føroysk viðurskifti, men sum hava verið varveitt í Danmark, kunnu latast (aftur) til Landsskjalasavnið ella á annan hátt gerast betri tøk fyri føroyingum.

[2] Talan var m.a. handilsbøkur frá Kgl. Handlinum, frágreiðingin hjá J.C. Svabo 'Indberetninger fra en Rejse i Færø 1881-82' og nøkur fá skjøl úr 16., 17. og 18. øld. Hesi vóru latin Landsskjalasavninum í sambandið við 75 ára hátíðarhald stovnsins.

[3] Broytingarnar høvdu til endamáls, at gera eitt greiðari arbeiðsbýti millum starvsfólkini, at raðfesta uppgávurnar hjá skjalasavninum og samstundis at menna fakliga virksemi á stovninum. Áður varð størstur dentur lagdur á lesistovuarbeiði, soleiðis at lesistovuvaktin í stóran mun stýrdi øllum øðrum virksemi á stovninum.

[4] Talgilda umsitingin umfatar www.history.fo, ið er ein heimasíða, ið m.a. miðlar talgild (skannað) skjøl, og www.skjalasavn.fo (í dag loyst av av www.savn.fo ), ið serliga er knýtt at Landsskjalasavninum sum myndugleiki og í sambandi við annað brúkaravirksemi. - Í tíðarskeiðnum 2003-07 hevði Landsskjalasavnið fleiri størri og minni framsýningar. Hesar framsýningar vóru allar væl vitjaðar (vanliga 1000-2000 vitjandi í 1-2 vikur), men vóru eisini lutfalsliga arbeiðskrevjandi. Samstundis hevði Landsskjalasavnið ikki sjálvt nakað høli til at hava størri fastar framsýningar. Tí var hetta arbeiðið í stóran mun skorið niður til luttøku í felags norðurlendska skjalasavnsdegnum (Arkivernes Dag), ið verður hildin 2. leygardag í november. Skjalasavnsdagurin hevur til endamáls at gera almenninginum vart við, hvat tað er av tilfari, ið skjalasavn hevur á goymslu. Flestu árini higartil hevur Landsskjalasavnið í sambandi við skjalasavnsdagin skipað fyri smærri framsýningum og fyrilestrum um evni, ið hava samband við skjalasavnsarbeiði og skjalarannsóknir. – Partur av broytingini í miðlapolitikki savnsins var, at Landsskjalasavnið fyri fyrstu ferð sum stovnur útgav eina bók, 'Brot úr Føroya Søgu' í 2010.

[5] Skipaða eftirlitið hevur havt við sær, at Landsskjalasavnið í dag hevur nógv betri innlit í støðuna innan almennu umsitingina kring alt landið og at almennu myndugleikarnir í vaksandi mun verða greiðir yvir týdningin av skipaðari skráseting og varðveiting. - Skipað eftirlit merkir eisini (meira) skipa góðkenning. Hetta hevur eisini við sær, at almennir myndugleikar í vaksandi mun søkja um góðkenning frá Landsskjalasavninum, tá tey skulu skipa sínar skrásetingar- (journal- og fakskipanir) og goymsluskipanir.

Eisini fór Landsskjalasavnið frá 2008 undir nýggja skráseting og pakking av savnindum á goymslunum. Ein stórur partur av søvnunum á goymslunum eru tí skrásett og pakkað um av nýggjum seinastu 4 árini.[6] Tó er nógv eftir at skráseta, sum áður ikki hevur verið skipað/skrásett. Landsskjalasavnið hevur eisini síðani 2004/05 roynt, við frágreiðingum, grundaðar á smærri kanningar, og við skipan av ráðstevnum, at varpa ljós á vaksandi týdningin av at seta í verk serliga elektroniska skjalasavnsvarðveiting.

## Hølisviðurskifti – skrivstovur og goymslur

Í 1932 flutti Landsskjalasavnið, saman við Amtsbókasavninum og Forngripagoymsluni, inn í nýbygdu Savnshúsini á Rossatrøðni/Debesartrøð í Havn, sum var høvuðssæti hjá stovninum til 1974, tá savnið flutti inn í V.U. Hammershaimbsgøtu 11, við goymslu og skrivstovum. Hetta vísti seg tó at vera ov trongt og síst í 1980-árunum flutti skrivstovur og skrásetingarhøli í V.U. Hammershaimbsgøtu 24 (Landavegi 29, Postmeistarahúsini). Í 1992 fór Landsskjalasavnið at leiga høli uttanfyri sjálvan býin, at hava fjargoymslu, har umleið helvtin av søvnunum í dag eru í varðveitslu. Í 2004 flutti Landsskjalasavnið við smærri verkætlanum inn aftur í Savnshúsini, og frá 2006 fekk stóra verkætlanin ‘Ættarbandsskráin’ høvðussæti her. Í 2011 yvirtók Fróðskaparsetrið Savnshúsini, og síðani hava eksternt fíggjaðar verkætlanir húsast í Postmeistarahúsunum. – Hóast tað var neyðugt at flyta nøkur eyka starvsfólk í høli í Postmeistarahúsunum, eru skrivstovuviðurskifti Landsskjalasavnsins nøktandi sum er. Hinvegin eru goymsluviðurskiftini als ikki nøktandi. Landsskjalasavnið hevur umleið helmingin av tí (pappírs-) goymsluplássi sum er neyðugt, fyri at uppfylla tey lógarfestu krøvin, sum verða sett til avhending/móttøku av almennum savnindum. Eisini eigur Landsskjalasavnið at fáa høli til serligt testverkstað til komandi elektroniskar avhendingar.

## Skjalasøvn, skráseting og avhending

Hóast elsta varðveitta savnindi er heilt aftur frá 1298 (Seyðabrævið), og fyrsta skipaða savnið er frá 1615 (tingbøkurnar), stavar størsti parturin av savnindum frá nýggjari tíð, fyrst og fremst frá 20. øld.

Nógv tey flestu søvn á goymslum Landsskjalasavnsins eru almenn søvn.[7] Landsskjalasavnið goymir eisini hópin av privatum søvnum, men hesi fylla ikki nógv í mun til almennu skjølini.[8] Landsskjalasavnið hevur heldur onga skipaða innsavning av privatum søvnum, m.a. tí at tey ikki eru fevnd av kjarnuøki Landsskjalasavnsins sambært lóg eins og almenn søvn eru tað.

Savnindini á goymslum Landsskjalasavnsins fylla umleið 5 hillakilometrar. Mett verður, at Landsskjalasavnið átti at havt umleið tað tvífaldaða av hillametrum, um allir almennir myndugleikar høvdu avhent tey skjøl, teir eiga sambært lóg. Fyri at fáa pláss fyri nýggjum avhendingunum, hevur seinastu árini verið neyðugt at vraka nógv skjøl, ið hava verið í varðveitslu á goymslum Landsskjalasavnsins í nógv ár. Eisini hevur Landsskjalasavnið innført ein nógv strangari

---

[6] Nýggja skrásetingin er gjørd í skipanini ASTA, ið er ein norsk skipan, serliga ment til skráseting av skjalasøvnum. Skrásetingin í ASTA er kvalitativt øðrvísi (betri) enn gomlu skrásetingarnar, partvís tí talan nú fyri fyrstu ferð er um eina skráseting av øllum søvnunum í eina og somu (elektronisku) skipan og partvís tí at krøvini sum Landsskjalasavnið í dag setur eru væl hægri, t.d. tá tað kemur til historik, neyvleika í skráseting og fylgifrágreiðing.

[7] Millum almennu søvnini á Landsskjalasavninum finnast løgtingið, sorinskrivaraembætið, landfútaembætið, sýslurnar, kommunurnar, amtið, ríkisumboðið, fólkakirkjan, landslæknin, skúlamyndugleikarnir og landsstýrið/miðfyrisiting.

[8] Av privatum søvnum, sum eru í varðveitslu, eru handilssøvn, søvn hjá ítróttafeløgum, peningastovnum, tryggingarfyritøkum, fakfeløgum, politiskum felagsskapum, einstaklingum o.ø.

'vrakingarpolitikk', ið hevur við sær, at vaksandi partur av hvørjari avhending verður vrakaður áðrenn skjølini koma á Landsskjalasavnið. Og so hevur Landsskjalasavnið eisini noktað fleiri almennum myndugleikum at avhenda og í staðin álagt teimum at varðveita tilfarið í egnum goymslum.

Í 2011 hevur Landsskjalasavnið móttikið 17 avhendingar (aksesiónir), ið tilsamans fylla nærum 210 hillametrar. Afturat hesum hevur savnið (ný-)skrásett umleið 245 hillametrar av savnindum, ið vóru á goymslum savnsins frammanundan. Orsakað av vantandi goymslupláss hevur Landsskjalasavnið í 2011 vrakað og burturbeint umleið 20 hillametrar av savnindum, ið áður vóru á goymslu Landsskjalasavnsins.

**Avhendingar, aksesiónir og skrásetingar 2011**

| | Eindir | Hillametrar |
|---|---|---|
| **Aksesiónir, privatur proveniensur** | 9 | 6 |
| **Aksesiónir, almennar proveniensur** | 8 | 203,5 |
| **Aksesiónir, tilsamans** | 17 | 209,5 |
| | | |
| **Skrásett søvn** | 16 | |
| **Skrásett stykkir** | 4550 | |
| **Skrásett legg** | 272 | |
| **Skrásettar savnseindir, tilsaman** | 4822 | 455 |

## Miðling

Áður var lesistovan nærum einasta miðlingaramboð Landsskjalasavnsins og í ávísan mun eisini hin týdningarmesti parturin av virksemi stovnsins. Í dag er miðlingin øðrvísi, fjølbroyttari og rúgvusmikil. Serliga hevur talgilda miðlingin víst seg at vera í vøkstri. Í 2010 kom verulig ferð á útlegging av mest brúktu savnindunum á heimasíðuna www.history.fo. Á hesi heimasíðu er ein rúgva av arkivalskum keldutilfari, bæði transkriberað og ikki-transkriberað (skannað). M.a. liggja fólkateljingar í tíðarsekiðnum 1801-1925, flest allar kirkjubøkur (høvdus-ministerialbøkur) í tíðarskeiðnum áðrenn 1910, skiftiprotokollir (1701-28 og 1816-1904) og festiprotokollir (1706-65 og 1811-78). Talan er m.a. um meira enn 50.000 skanningar. Í 2011 vóru umleið 4.000 skanningar gjørdar, fyrst og fremst 'Festiprotokollir', sum síðani vóru lagdar út á www.history.fo.

Tilsamans hava verið sløk 3.350.000 'hitt' á www.history.fo í 2011. Talið av vitjandi var gott 28.000. Tal av 'unikkum' vitjandi um mánaðin á heimasíðuni í 2011 hevur svingað millum 476 í juli til 1769 í mars.

**Nýtsla av www.history.fo og tal av vitajandi 2011**

| Mánaður | Unikk vitjandi | Tal av vitjandi | Síður | 'Hitt' á history.fo | Bandvídd |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Januar*** | 1129 | 2708 | 134140 | 328047 | 18.72 GB |
| ***Februar*** | 898 | 2504 | 132652 | 346839 | 21.18 GB |
| ***Mars*** | 1769 | 3739 | 190402 | 423481 | 23.89 GB |
| ***Apríl*** | 849 | 2576 | 129052 | 304226 | 19.07 GB |
| ***Mai*** | 509 | 1829 | 95306 | 215812 | 13.18 GB |
| ***Juni*** | 506 | 1729 | 106550 | 254864 | 16.77 GB |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Juli*** | 476 | 1726 | 112518 | 247366 | 17.22 GB |
| ***August*** | 515 | 1906 | 97346 | 200060 | 12.73 GB |
| ***September*** | 693 | 2319 | 106296 | 210593 | 12.68 GB |
| ***Oktober*** | 714 | 2324 | 137135 | 266272 | 17.89 GB |
| ***November*** | 735 | 2434 | 140311 | 287141 | 18.79 GB |
| ***December*** | 622 | 2209 | 134998 | 264307 | 17.85 GB |
| ***Total*** | **9415** | **28003** | **1516706** | **3349008** | **209.97 GB** |

Í 2011 vóru nógv tey flestu ið vitjaðu www.history.fo úr Føroyum, síðani vóru tað fólk búsitandi í Danmark og sum nr. 3 komu brúkarar búsitandi í Canada. Eisini vóru onnur, t.d. norðurlond, á listanum av brúkarum, men einki í mun til omanfyrinevndu lond.

Fyri nøkrum árum síðani vóru millum 1000 og 2000 vitjandi á lesistovuni hjá Landsskjalasavninum um árið. Hetta talið hevur verið fallandi, soleiðis at talið av vitjandi í 2011 var undir 800. Mest sannlíkt er at ein ávísur samanhangur er millum økta talgildu internetmiðlingina og minkandi lesistovuvirksemi

**Tal av vitjandi og útláni á lesistovu**

**2011**

| **Mánaður** | **Gestir** | **Útlán** | **Bólkar** | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|---|---|
| Januar | 75 | 84 | | |
| Februar | 78 | 96 | | |
| Mars | 90 | 147 | | |
| Apríl | 65 | 92 | | |
| Mai | 69 | 97 | | |
| Juni | 44 | 56 | | |
| Juli | 38 | 103 | | Stongt viku 30 og 31 |
| August | 50 | 88 | 1 | Stongt viku 35 |
| September | 93 | 145 | 2 | |
| Oktober | 50 | 68 | | |
| November | 118 | 94 | 3 | |
| Desember | 22 | 22 | | Stongt viku 52 |
| **Samanlagt** | **792** | **1092** | **6** | |

Mest nýttu savnindini eru úr skjalasøvnunum hjá prestagjøldunum og fútanum. Hjá prestagjøldunum eru tað serliga kirkjubøkur, ið verða nýttar, meðan tað hjá fútanum eru savnindi, ið hava við skip og manningar at gera, ið hava størsta áhuga hjá teimum vitjandi. - Í 2011 vitjaðu 6 størri bólkar (lesandi, skúlaflokkar o.l.) lesistovuna.

Almennir stovnar læna eisini avhend mál aftur. Í 2011 var talið 51, sum er umleið helvtin av tí tað var í 2012. Eisini lænir Landsskjalasavnið mál heim frá útlendskum søvnum at nýta á lesistovuni. Í 2011 var talið av slíkum útlendskum søvnum fimm. Í 2011 hevði Landsskjalasavnið 429 fyrispurningar/málsviðgerðir, og er hetta eitt sindur minni enn í 2010.

## Eftirlit og góðkenning

Síðani 2006 hevur Landsskjalasavnið havt skipað stovnseftirlit og í tí sambandi vitjað fleiri almennar myndugleikar um árið fyri at kanna teirra skráseting og goymslur. Tað er ymiskt frá ári til ár, hvussu nógvir stovnar fáa vitjan. Í sambandi við hesar vitjanir verða eisini spurningar um møguligar avhendingar tiknar upp. – Landsskjalasavnið ráðgevur eisini almennum myndugleikum og undirvísir alment settum starvsfólki í ymiskum viðvíkjandi journal- og goymsluviðurskiftum. Hetta virksemið er tó ringt at meta um støddina av. Sum heild letur til at hetta virksemi er í minking, tí bert eitt skeið var av slíkum slagi.

Í 2011 vitjaði Landsskjalasavnið fimtan stovnar og ráð. Í onkrum føri varð neyðugt at vitja stovnin meira enn eina ferð.

| **EFTIRLITSVITJANIR 2011** | | |
|---|---|---|
| Arbeiðsloysisskipanin ALS | Framtaksgrunnurin | MRCC – Tórshavn Radio |
| Arbeiðseftirlitið | Havstovan | Rúsdrekkasøla Landsins |
| Skipaskrásetingin FAS | Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Skipaeftirlitið |
| Fjarskiftiseftirlitið | Jarðfeingi | Vinnuframagrunnurin |
| Føroya Kærustovnur | Lønardeildin | Vinnumálaráðið |

Eftirlitið hevur víst, at nógv skjalasøvn hjá almennum myndugleikum ikki eru skipað og skrásett, og tey verða ofta varðveitt í hølum, ið ikki eru hóskandi til skjalagoymslu. Sostatt er vandin stórur fyri, at eldri og lokað pappírssavnindi farast.

Eftirlitið hevur eisini víst, at (talgildu) dátunøgdirnar eru øktar ógvuliga nógv seinastu árini. 2011 er einki undantak. Hetta hevur ávrikan á arbeiðið hjá Landsskjalasavninum. So hvørt sum tøknin hevur ment seg og føroyska umsitingin kring landið er farin at nýta talgildar skipanir, hevur tann parturin av virkseminum, sum snýr seg um tryggjan av skjølum við fyrisitingarligum og rættarligum virði fyri borgarar og fyri myndugleikar, fingið vaksandi týdning. Í dag snýr tað seg ikki einans um at gera tey tøk fyri granskinga í framtíðini, men í øktan mun um at tryggja skjølini her og nú, soleiðis at tey altíð eru tøk hjá tí einstaka borgaranum, ið hevur fyri neyðini at prógva egin rættindi, ella hjá fyrisitingini, ið hevur brúk fyri at skjalprógva málsviðgerð. – Trupulleikin er, at slík tryggjan krevur eyka førleika, saman við tí sum Landsskjalasavnið hevur í dag, útyvir tað ið finst í Føroyum í dag, Hetta hevur ført við sær, at spurningurin um elektroniska varðveiting í dag er hin størsta avbjóðingin ið er innan skjalasavnsøkið. Landsskjalasavnið hevur síðani 2003 við jøvnum millumbili víst á hesa avbjóðing og hevur samstundis víst á, at neyðugt er hjá miðfyristingini at seta eyka fígging av, bæði til íløgur og rakstur, um hendan avbjóðing skal handfarast rætt.

Landsskjalasavnið fær við jøvnum millumbili umsóknir frá almennum myndugleikum um loyvi til at seta í verk elektroniskar skrásetingarskipanir. Av tí at tað ikki er gjørligt at steðga hesari menning í umsitingini, verður Landsskjalasavnið í flest øllum førum noytt at geva loyvi. Hinvegin eru enn ikki umstøður til talgilda varðveiting í Føroyum, fyrst og fremst tí at fígging vantar til serkøn fólk og testverkstað. Tí er neyðugt hjá Landsskjalasavninum at krevja, at alt tilfarið í elektronisku skipanunum skal kunna prentast út í sambandi við avhending til Landsskjalasavnið. Í 2011 fekk Landsskjalasavnið einans tvær umsóknir

um góðkenning av nýggjum talgildum skrásetingarskipanum. Landsskjalsavnið heldur tó, at fleiri skipanir verða settar í verk, uttan at søkt verður um loyvi til hetta.

## Gransking, altjóða samstarv v.m.

Granskingin á Landsskjalasavninum hevur til endamáls at stuðla øðrum virksemi og brúkast sum grundarlag undir skráseting av søvnum á goymslu og vegleiðing/ráðgeving av brúkarunum. Granskað verður fyrst og fremst í evnunum: arkivistik, umsitingarsøga, politisk søga, handilssøga og felagssøga.

Altjóða samstarv, serliga norðurlendska samstarvið, hevur víst seg at vera sera umráðandi fyri fakligu menningina. Limaskapurin í altjóða arkivfelagsskapinum ICA og norðurlendska Nordisk Arkivnyt geva Landsskjalasavninum fakligan íblástur. Avtalur um brúk av serligum skipanum (t.d. ASTA), setur røttu fakligu krøvini, og skeiðs- og ráðstevnuvirksemi (t.d. 'Útnorður Skjalasavnsráðstevnan') eru við til at menna starvsfólkini fakliga og skapa faklig netverk.

Í døgunum 30. august til 1. september 2011 skipaði Landsskjalasavnið fyri Útnorður Skjalasavnsráðstevnuni, sum verður hildin 3. hvørt ár í ávikavist Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Á ráðstevnuni, ið varð hildin á Gjáargarði, vóru 32 luttakarir úr Útnorðuri og úr Danmark. Ráðstevnan varð býtt upp í 4 tema: 1. Undervisning og formidling i arkiverne, 2. Digitalisering – bevaring og tilgængeliggørelse, 3. Tilsyn med og rådgivning af offentlige myndigheder og 4. Aktuelle forskningsprojekter. Ráðstevnan var sera væl eydnað.

Í 2011 høvdu starvsfólk á Landsskjalasavninum hesar útgávur:

1. Sámal T.F. Johansen: 'Færøerne' i 'Den kolde krig og Danmark – Gads Leksikon', red: Lauridsen et al
2. Sámal T.F. Johansen: 'Vestnordiske arkivers komplekse udfordringer' i 'Nordisk Arkivnyt 4, 2011

# *Fornminnissavnið*

## Endamál og uppgávur

Føroya Fornminnissavn savnar, skrásetir og sýnir fram fram fornlutir og lutir úr nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar.

Fornminnissavnið hevur eisini til uppgávu
- at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum og fyrireikar og stendur fyri, tá ið toftir og forn búpláss og søgulig lendi verða grivin út.
- at hava eftirlit við friðaðum bygningum.
- at vera fakligur myndugleiki í sambandi við fornlutir í havinum.

Mentanararvurin er felags minni okkara um samfelag og liviumstøður hjá farnum ættarliðum. Fólk hava allar tíðir sett spor eftir seg í umhvørvinum. Hesi spor kunnu vera amboð, myndir, bygningar og onnur bygging. Hesi spor hava mangan annan týdning fyri okkum, sum liva í dag, enn fyri tey, sum settu tey. Mentanarminnini sýna bæði framhald og broytingar gjøgnum tíðirnar. Tey eru tí støði undir tulkingum og fatanum okkara av fortíðini. Tey eru sostatt við til at gera fatan okkara av egnari tíð og skapan okkara av framtíðini. Mentanarminni eru støðugt hótt, bæði av tíðarinnar tonn og broyttum brúki.

Føroya Fornminnissavn virkar fyri eini livandi tilgongd hesum viðvíkjandi, har støðugt verður mett um, hvussu varðveiting av menntanararvi kann gerast betri. Savnið virkar eisini fyri, at okkara tíð verður partur av framtíðarinnar mentanararvi.

Fornminnissavnið var í 2011 skipað í tríggjar deildir: Fornfrøðideildin, bygningadeildin og fólkalívsdeildin. Uppgávurnar hjá deildinum fevna um antikvariskt virksemi og musealt virksemi. Símun V. Arge, deildarleiðari á fornfrøðideildini, var í 2011 settur fyribils sum leiðari á Fornminnissavninum við meðan umskipanin av Søvnum Landsins fer fram.

## Antikvariskt virksemi

*Fornfrøðideildin:*

Deildin hevur gjørt umfatandi skráseting av krígsminnum við flogvøllin í sambandi við útbygging av Vága Floghavn og latið Fornminnisnevndini tilmæli. Deildin var og skrásetti fornminni í sambandi við bygging av fjósi á Trøllanesi. Deildin skrásetti partar av gólvinum í bóndahúsinum í Depli í sambandi við restaureringsarbeiðini har. Deildin hevur gjørt GIS-skráseting av Bønhústoftini í Leirvík. Ólavsøkuaftan fekk deildin fráboðan um skipsvrak á sandinum í Sørvági og gjørdi skrásetingar í tí sambandi. Deildin lagt bygningadeildini lag á uppmáting við GIS-útgerð í sambandi við bygningasrásetingar á hvalastøðini við Áir.

Kirkjugarðurin í Sørvági. Í sambandi við útbyggingarætlanir norðan fyri kikrjuna í Sørvági, gjørdi Fornminnissavnið fornfrøðiliga forkanning a staðnum. Komið var fram á fornar bústaðaleivdir, ið skjalprógvaðu, at búleikast hevur verið har á staðnum í hvørt fall einaferð í miðøld. Bústaðaleivdirnar eru umfataðar av fornminnalóggávuni, og verður tí ikki bygt á staðnum sum ætlað.

Gjørdar vórðu uppfylgjandi fornfrøðiligar kanningar í Koltri.
Arbeitt hevur verið framhaldandi við fornminnaskránni , ið er ein av raðfestingunum á deildini.

Granskingarráðið játtaði fíggjarligan stuðul til eftirviðgerð og greining av sýnum, ið stava frá fornfrøðiligu rannsóknunum á Sondum heima á Sandi, ið vórðu framdar innan verkætlanina "Heart of the Atlantic". Eftirviðgerðin verður gjørd í samstarvi við Durham University, UK.

*Bygningadeildin:*

Meginuppgávan hjá Bygningadeildini er at taka sær av antikvariskum málum um friðaðar bygningar og gransking í hesum sambandi. Skaði var tíverri á fleiri friðaðar bygningar í 2011. Húsini í Kálvalíð fingu

nakað av skaða á høvuðskonstruktiónina. Í sambandi við eitt ferðsluóhapp kom skaði á eitt hoyggjhús í Kvívík, og stormskaði var á nøkur úthús.

Fornminnissavnið eigur friðaðir bygningar kring landið, og stendur Bygningadeildin fyri viðlíkahaldi og umvæling av hesum. Eisini ger Bygningadeildin restaureringsætlanir fyri teir bygningar, sum hava tørv á hesum. Millum ognirnar hjá Fornminnissavninum kann nevnast gomlu bóndahúsini í Hoyvík, sum virkar sum útisavn, bóndahúsini í Depli, Dúvugarðar í Saksun, í Koytu á Sandi og Uttan Ánna í Sandvík. Í 2011 varð hoyggjhúsið uttan Ánna høvuðsumvælt og jarntekjan varð skift við flagtekju á timburtróðri. Gjøgnum nøkur ár er farið fram eitt størri restaurerings og umvælingar arbeði í Depli. Tá hetta arbeiði er liðugt verður orka til at fara undir størri arbeiði á aðrar bygningunum, sum eisini hava fyri neyðuni ábøtur.

Í sambandi við verkætlanina um Hvalastøðina við Áir luttekur Bygningadeildin eisini við sínum fakliga parti. Hetta snýr seg eitt nú antikvariska skráseting, at rekonstruera bygningssøguna og at gera uppskot til antikvariska handfaring í sambandi við umvælingararbeiðið. Næmingar á Tekniska Skúla í Tórshavn vóru við til at máta upp.

Bygdasøvnini og Føroya Forngripafelag eiga hús kring landið. Ikki øll hesi eru friðaði, men verða handfarin sum friðaði. Í hesum sambandi letur Bygningadeildin eisini vegleiðing um, hvussu tey skulu viðlíkahaldast og umvælast. Eisini ger Bygningadeildin ummæli, um eitt bygdasavn ynskir at ogna sær eini gomul hús.

Bygningadeildin útvegar og mennir eisini vitan í sambandi við friðaðar bygningar. Hetta snýr seg eitt nú um hitaskipanir og ljósskipanir, hvat tilfar eigur at nýtast til viðlíkahald og umvæling, og hvussu ein kann nýta bygningar í mun til tey krøv nútíðin setur. Bygningadeildin arbeiðir eisini saman við aðrar myndugleikar, bæði landsmyndugleikar og kommunalar myndugleikar. Tað kann vera eitt nú í sambandi við byggisamtyktir ella býaratlas. Bygningadeildin hevur eisini gjørt viðmerkingar í sambandi við uppskotið til byggilóg.

*Kirkjubømúrurin*

Hildið varð á fram við varðveitingararbeiðunum upp á Múrin í Kirkjubø í tíðarskeiðinum mei-august. Serligur dentur var lagdur á at fremja bygningafornfrøðiliga skráseting av múrverkinum fyri at staðfesta upprunamúrverk eins og á skráseting av skaddum gróti í múrverkinum við tí fyri eyga at menna konserveringstiltøk av skaddu laðingarsteinunum. Somuleiðis varð farið undir at útmúra fugur í múrverkinum, har lagt var upp til arbeiðið komandi summar, tá ætlanin er at føroyskir múrarar fara undir endaligu útmúringina, og farið verður undir at taka veðurverjuna niður, so hvørt múraraarbeiðini eru liðug.

Sum liður í varðveitingararbeiðinum, varð skipað fyri sonevndum grundifundi í september í Roykstovuni í Kirkjubø. 10 útlendskir serfrøðingar við serligari vitan um gotiskan arkitektur og kirkjubygging fingu innbjóðing at luttaka saman við savnsfólkum úr Føroyum annars. Fundurin vardi í 3 dagar og endaði við almennum tiltaki, har eini 60 fólk hóast ódnarveður møttu og fingu frágreiðing um tað, ið tjakast hevði

verið um á fundinum eins og um ymiskar áhugaverdar niðurstøður komið varð fram til. Framløgurnar fara at verða givnar út á prenti.

*Hvalastøðin við Áir*

Søvn Landsins fingu í 2011 eina játtan til trygging av hvalastøðini við Áir, sum er ein týðandi partur av ídnaðarliga mentanararvi Føroya. Hvalastøðin varð sett á stovn og rikin av norskum hvalaveiðimonnum frá 1905 til 1930. Síðani tóku føroysk feløg yvir. Síðan síðsti hvalurin varð skotin og tikin upp í 1984 hevur hvalastøðin og gripatilfarið har verið undir musealum eftirliti og støðin sjálv hildin neyðugt viðlíka um so var, at farið varð undir handilsliga hvalaveiðu aftur. Nú hava landsmyndugleikar umsíðir ásannað, at framleiðsla í sambandi við møguliga framtíðar stórhvalaveiðu ikki fer at vera í hesum antikka framleiðsluumhvørvinum. Ístaðin verður nú miðað eftir at finna nýggjar nýtslumøguleikar, har tey antikvarisku áhugamálini liggja fremst í huga. Í 2011 varð farið undir at rudda í økinum, tryggja bygningar og gera bygningafornfrøðiligar skrásetingar, og arbeiðið heldur fram í 2012 við umvælingum og menning av verkætlanini. Menningararbeiðið verður gjørt í samstarvi við Sunda kommunu og Landsverk.

## Musealt virksemi

*Fornfrøðideildin:*

Arbeitt hevur støðugt verið við skráseting av fornfrøðiligum gripum, ið eru savnaðir við fornfrøðiliga virksemi á deildini. Hesir verða lagdir inn á skrásetingarskipanina Regfo, sum er atkomulig á internetinum.

Fornfrøðideildin hevur tikið lut í arbeiðinum saman við Náttúrugripasavninum og Jarðfeingi at fyrireika felags framsýning í Brekkutúni. Heldur fram í 2012.

Deildin hevur móttikið tveir jarðfunnar gripir í 2011. Hópurin av fyrispurningum til deildina eru svaraðir.

Konserveringstøkningurin á deildini varðar av konseerveringstiltøkum í sambandi við framsýningar, harundir reinhald, savnsbúð, konserveringsráðgeving til bygdasøvn, kirkjur o.o.

*Fólkalívsdeildin:*

Fólkalívsdeildin var nógv knýtt verkætlanini at varðveita hvalstøðina við Áir. Verkætlanin í 2011 var at fáa skil á, hvørjum standi húsini vóru í, at rudda og savna saman gripir og útgerð. Í tíðini frá fyrst mars, og fram til hálvan september brúkti deildin 40% av arbeiðstíðini á hvalastøðini við Áir. Hetta merkti, at aðrar uppgávur fingu lægri raðfesting.

Fólkalívsdeildin hevði í 2011 verkætlanarleiðslu í sambandi við hvalastøðina við Áir og skipaði saman við starvsfólkum á Náttúrugripasavninum fyri almenna tiltakinum "Støðin er opin" tann 17. september 2011. Tiltakið eydnaðist væl, og fólksligi áhugin var stórur. Eini 500 fólk løgdu leiðina á hvalastøðina, og stovnurin fekk fleiri upplýsingar, gripir og myndir frá fólki.

Arbeiðið at skráseta gripir í goymsluni í Brekkutúni var í tíðum ein dag um vikuna, eins og myndaskrásetingin helt fram.

Fakligir fyrispurningar frá leikum og lærdum komu javnan. Summir fyrispurningar vóru lættir at avgreiða, meðan aðrir vóru meira tungir og av prinsipiellum slagi. Skúlatænastan og samstarvið við skúlaverkið var eisini javnt, eins og Savnfagnaðurin um heystið tók sína tíð.

Skúlatænastan á Fornminnissavninum virkar undir fólkalívsdeildini, og savnslærarin hevur knýtt eitt nærri samband við skúlaverkið, bæði at miðla framsýningina í Brekkutúni og á útisavninum í Hoyvík. Saman við savnslæraranum á Náttúrugripasavninum hevur verið arbeitt við at samansjóða skúlatænastuna á báðum søvnum framyvir.

Innsavning av savnindum, ið hava við maritima søga at gera var, og er partur av virkseminum hjá deildini. Deildin fekk samband við sjó- og fiskimenn, og vil skapa eitt netverk at byggja á framyvir.

Starvsfólk á deildini hava tikið lut í nevndini at orða ”Álit um at skapa føroyskum bátasmíði livilíkindi”. Liðugt og handað mars 2012.

Deildin tók lut í arbeiðinum saman við Náttúrugripasavninum og Jarðfeingi at fyrireika felags framsýning í Brekkutúni. Heldur fram í 2012.

Serframsýningin 7. juli – 4. oktober við føroyskum pløggum *At binda – ull er Føroya gull*.

Deildin tók lut í samstarvinum millum maritim søvn í Europa og í Skandinavia, Association of North Sea Cities – ANSC. Fundur á savninum MAS í Antwerpen 27.-29. mai. Samstarvið fyrireikar felags europiska framsýning við heitinum *Maritime People – then and now*. Heldur fram í 2012.

Deildin tók lut í samstarvinum millum søgufrøðingar í Grønlandi, Íslandi, Føroyum, Noregi og Danmark, Netværk for samarbejde omkring dokumentation, historieskrivning og formidling af de vestnordiske landes fælleshistorie VNH, um søguverkið *Naboer i Nordatlanten. Hovedlinjer i Vestnordens historie gennem 1000 år*. Bólkin kemur eftir ætlan út í juni 2012.

## *Náttúrugripasavnið*

Endamálið hjá Føroya Náttúrugripasavnið er at savna, varðveita og sýna fram náttúrugripir, sum lýsa náttúru landsins, og at savna, varðveita og handfara náttúruvísindaligt tilfar. Virksemið hevur fram til 2012 verið skipað í tvær deildir eina djóra- og eina plantudeild við hvør sínum deildarleiðara, men í samband við skipan av Søvnum Landsins, er Havlívfrøðiliga Royndarstøðin vorðin ein partur av Náttúrugripasavninum soleiðis at djóradeildin er býtt sundur í tvey, eina landdjóradeild og eina sjódjóradeild.

Leivur Janus Hansen djórafrøðingur tók við sum leiðari av landdjóradeildini eftir at Dorete Bloch valdi at fara niður í tíð nú hon var komin til pensiónsaldur. Anna Maria Fosaa deildarleiðari á plantudeildini, ið virkaði sum leiðari á Náttúrugripasavninum til 1. mars 2011, verður sitandi sum leiðari á savninum ímeðan samanleggingina av søvnunum fer fram. Í november í fjør andaðist okkara konservator Eyðfinnur Stefansson, hann hevði starvast á savninum í 36 ár.

## Framsýningar

Framsýning um vakstrasøgu og broytingar í plantuvøkstrinum frá planturnar komu til Føroyar aftaná seinastu ístið og fram til í dag er endurnýggja. Hendan framsýningin byggir á virknu granskingina innan hetta økið sum savnið stóð fyri fram til 90 árini.

Í urtagarðinum er gjørd ein minni framsýning um nýtsluplantur, hendan framsýning byggir á grein um tað sermerktu floruna kring búseting í miðøldini. Skeltir eru sett á nakrar av hesar plantunum við upplýsingum um, hvat hesar hava verið nýttar til.

Luttøka í arbeiðinum viðvíkjandi skráseting av lutum á Hvalastøðini við Áir, umframt at savnið eisini hevur gjørt upplýsandi tilfar um støðina.

Í fjør vitjaðu tilsamans 3340 fólk savnið, av hesum vóru 1798 vaksin, 1171 børn umframt 371 skúlanæmingar. 2230 av samlaða vitjanartalinum vóru føroyingar ímeðan 1110 vóru útlendingar. Av samlaða talinum var á leið 1/3 vitjanir á savnsfagnaðinum.

## Gransking á djóra- og plantudeildini

Starvsfólk frá Náttúrugripasavninum savna tilfar frá so nógvum grindum sum gjørligt, fyri at kanna lívfrøðina hjá grind. Størst dentur verur lagdur á at kanna nøring, vøkstur og føði, men savnið savnar eisini annað tilfar inn, ið verður varðveitt í einum størri savni við lívfrøðiligum tilfari frá grind. *Ábyrgd hevur Bjarni Mikkelsen*

Kópur. Náttúrugripasavnið hevur seinastu tvey árini savnað hagtøl yvir hvussu nógvur kópur verður veiddur í Føroyum. Ætlanin er eisini at gera eina stovnsmeting av láturkópi, soleiðis at til ber at meta um støðuna og at kunna taka umsitingarlig atlit at láturkópinum, um hetta verur ynskiligt. *Ábyrgd hevur Bjarni Mikkelsen*

Í samstarv við Hein van Grouw og Povl Skårup er tilfar um hvítravn savnað og viðgjørt. *Ábyrgd hevur Dorete Bloch.*

Tilfar um nevtoll er savnað og viðgørt. *Ábyrgd hevur Dorete Bloch.*

Sambandið millum vøkstur og veðurlag verður kannað í tveimum altjóða verkætlanum. Hesar eru ITEX (International Tundra Experiment). Hin er GLORIA (Global Observation Research Initiative in Alpine Environments).

Endamálið við ITEX (International Tundra Experiment) at efturgera veðurlagsbroytinar við smáum vakstrarhúsum og síðani fylgja við árininum á vøksturin. Ein støð eri upp í 600 m hædd á Sornfelli. Verkætlanin byrjaði í 2001 og er her heima ein kombinerað kanning av árininum á vøksturin av seyðabiti og veðurlagsbroytingum. Mátingar av vøkstri verður gjørt hvørt summar og hitin verður máldur. Vit hava

fleiri ferðir rapporterað data til netverkið, sum verður okkara íkast til felags vísindaligar greinir. Somuleiðis sum vit eisini hava luttikið á ráðstevnum og lagt fram úrslit. Stovnurin hevur fíggja stórsta partin av arbeiðinum, men Amerikanska granskingarráðið hevur goldið fyri til luttøku á workshop umframt at fólk úr USA ið hava vitja allar støðirnar ið eru virknar og tikið sýni, eisini hava verið og vitja hjá okkum. *Ábyrgd hevur Anna Maria Fosaa*

GLORIA - Global Observation Research Initiative in Alpine Environments, er granskingarsamstarv ið Náttúrugripasavnið bleiv partur av 2009. Endamálið við verkætlanini er at seta á stovn og røkja eina heimsumfatandi langtíðar eftiransingarskipan í fjallaøkjum. Vøkstur og hiti verða innsavnað í GLORIA økjunum og verða nýtt til at skráseta broytingar í lívfrøðiliga margfeldinum og samanbera tær við hitabroytingar. Tey innsavnaðu data verða nýtt til at spáa um komandi broytingar í livfrøðiligum margfeldi í teimum viðbreknu fjallaøkjunum, sum áhaldandi eru útsett fyri teimum alsamt økjandi veðurlagsbroytingunum. Fýra fjallatindar eru moniteraðir og eru partar av arbeiðinum, hesi eru Lambafelli, Tungliðufjall, Sátan og Sandfelli.  Øll data verða rapportera til felag databasum í Eysturríki www.gloria.ac.at Náttúrugripasavnið hevur fíggja arbeiðið í 2009 og í 2010 lat Innlendismálaráðið stuðul. Hitamátarar ið liggja á teimum fýra fjallatindunum verða so vítt gjørligt avlisnir eina ferð um árið. *Ábyrgd hevur Anna Maria Fosaa*

Greining og kortlegging av plantudamfeløgum í økinum Føroyar, Ísland og suðurgrønland, hetta er ein partur av eini størri verkætlan undir CAFF florabólkinum. *Ábyrgd hevur Anna Maria Fosaa*

Ryggleys djór í áum. Ph.D. verkætlan har endamálið er, at lýsa útbreiðsluna av mýggjabitaormverum og várfluguormverum, at lýsa lívsringrásirnar hjá hesum ormverum og lýsa, hvørji ryggleys djór finnast í áum í Føroyum. *Ábyrgd hevur Leivur Janus Hansen*.

## Verkætlanir

Í 2010 setti Innlendismálaráðið gongd á arbeiði við at lýsa nøkur økir sum sonevnd Ramsar-økir. Hetta inniber, at fuglalívið í Skúvoy, Nólsoy og Mykinesi skal lýsast nærri. Í 2011 stóð Náttúrugripasavnið fyri at fyrireika og byrja teljing av lundastovninum í Mykinesi. *Ábyrgd hevur Háskóli Islands og Náttúrugripasavnið, PhD lesandi er Leivur Janus Hansen*.

Náttúrugripasavnið og Zoologisk Museum í Danmark hava eina samstarvsavtalu um ringmerking av fuglum. Náttúrugripasavnið umsitur ringmerkingarloyvi og  innsavnar upplýsingar um ringar, ið fólk hava funnið ella lisið av, og sendur tað víðari til Zoologisk Museum. Einans ringar hjá Zoologisk Museum kunnu nýtast í Føroyum. *Jens-Kjeld Jensen* tekur sær av hesum partinum. Ein fyribils uppgerð vísir, at 2702 fuglar vórðu ringmerktir í Føroyum í 2011, og at talan er um 37 fuglasløg. Hetta er fyrsta árið, at dimmur velreyði er ringmerktur í Føroyum. *Ábyrgd hevur Leivur Janus Hansen.*

Grunnur Aage V. Jensens hevur stuðlað Zoologisk museum í Keypmannahavn við peningi, og tað skal í samstarvi við Náttúrugripasavnið skriva eitt ringmerkingaratlas eins og tey, ið vit kenna frá okkara grannalondum. Allar afturmeldingar av teimum uml. 100.000 fuglunum, sum eru ringmerktir her, verða viðgjørdir vísindaliga, og allar fráboðanir vístar á kortum og talvum. Arbeiðið verður væntandi liðugt í 2012 og verður tá helst útgivið sum eitt serprent av Dansk Ornitologisk Forenings Tidsskrift *Ábyrgd av føroyska partinum hevur Leivur Janus Hansen.*

ReNo (Restoration of Damaged Ecosystems in the Nordic countries - a Nordic multidiciplinary network) er verkætlan undir Norðurlandaráðnum hvørs endamál var at lýsa endurnýggjan av vistskipanum. Føroyski parturin av arbeiðinum var frágreiðingin ið fleiri føroyskir stovnar hava skrivað tilfar til. Anna Maria Fosaa virkaði sum samskipari úr Føroyum ímeðan William Simonsen var í bólkinum sum serfrøðingur, seinnri kom Annika Berg SEV, og Leivur Janus Hansen Náttúrugripasavnið eisini í bólkin. *Ábyrgd hevur Anna Maria Fosaa.*

Verkætlanin "Fortsatte undersøgelser af grindehvalernes vandringer i Nordatlanten" er verkætlan undir danska *Miljøstyrelsen* hvørs endamál er at kanna ferðing og útbreiðslu hjá grind í Norðurhøvum. Úrslitini frá hesi verkætlan skulu endaliga verða partur av eina vísindaliga meting av um føroyska grindaveiðan er burðardygg. *Bjarni Mikkelsen er verkætlanarleiðari.*

Føroyska Náttúran alt árið. Verkætlanin snýr seg um at at skriva eina myndaríka hondbók, ið vísur tað, ein kann vænta av upplivingum í Føroysku náttúruni ymisku árstíðirnar. Innlendismálaráðið játtaði at stuðla verkætlanini av játtanini til umhvørvis-verndartiltøk 2011. *Ábyrgd hevur William Simonsen*.

Vøksturin við Nesvatn og Eystnes. Í samband við at SEV hevur ætlanir um at seta fleiri vindmyllur upp í Neshaga varð heitt Náttúrugripasavnið um at gera eina meting av, um vegagerðin og vindmyllurnar fóru at verða til ampa fyri vøksturuin. *Ábyrgd hevur Anna Maria Fosaa.*

## Miðlan

Í 2011 sendi Náttúrugripasavnið bert 11 tíðindaskriv. Hetta er væl minni enn í 2010 tá savnið megnaði at hava upplýsingar um eina plantu ella eitt djór á leið eina ferð um vikuna, umframt eisini at hava onnur tíðindi.

Dorete Bloch hevur ritstjórnað Fróðskaparrit 59 saman við E.S. Jacobsen

Leivur Janus Hansen hevði framløgu um rottutýning í Posthúskjallaranum 16. Juni.

Í 2011 luttók Náttúrugripasavnið í útvarpsendingunum Vitan undir heitinum allheimsupphiting og á hvønn hátt hendan fer at ávirka plantur og djór. *Luttøka Anna Maria Fosaa og Jens Kjeld Jensen*

Á ársfundinum hjá grindamannafelagnum í Norðurlandahúsinum kunnaði *Bjarni Mikkelsen* um framtíðar granskingarætlanir av grindahvali.

Stovnurin kunnaði um granskingina á Vísindavøkuni í Norðurlandahúsinum.

## Útgávur

**Bloch, D**. 2011. Grindehval i ét hug. pp: 114-127. *In*: Damsgaard, N. and Petersen, A.H. (eds). Hvaltegn & dyrespor. Feltgrafik af pernille Kløvedal Helweg. Vejle Kunstmuseum, Fuglsang Kunstmuseum, Kunsten Museum of Modern Art Aalborg, Stavanger Kunstmuseum, Nordens Hus, Tórshavn. ISBN: 978-87-7388-082-1.

**Bloch, D**., Desportes, G., Harvey, P., Lockyer, C. and Mikkelsen, M. 2011. Risso's Dolphin (*Grampus griseus* )(G. Cuvier, 1812), off the Faroe Islands. Paper SC/18/10 presented to the NAMMCO Scientific Committee, Faroe Islands, May 2011. *Aquatic Mammals Journal.*

**Bloch, D**. 2011. Skaðadjór 12. Smærumotta. *Frøði* 16,1: 52-53.

Christensen, T., Payne, J.F, Schmidt, N.M., Madsen, J., Taylor, J. J., Doyle, M., Gill, M.,Nymand, J., Svoboda, M., Rosa, C., Shuchman, B., Soloviev, M., Aronsson, M., Paakko, E., **Fosaa, A.M**., Heidmarsson, S.& Solberg, B.Ø. 2011. Terrestrial Expert Monitoring Plan – background paper. A Supporting Publication to the CBMP Framework Document. CAFF International Secretariat, CAFF Monitoring Series Report Nr. 6. ISBN 978-9935-431-11-0

Dam, M., Bavel, B.van, Rigét, F., Rotander, A., Polder, A., Auðunsson, G.A., **Bloch, D**., Víkingsson, G.A., **Mikkelsen, B**., Gabrielsen, G.W. and Sagerup, K. 2011. "New" POPs in marine mammals in Nordic Arctic and NE Atlantic areas during three decades. TemaNord

**Fosaa, A.M**. 2011. Reydlig bjargablóma *Silene dioica.* Føroysk frímerki.

**Fosaa, A.M**., Danielsen, O. and Nyholm Debess, H. 2011. The influence of experimental warming on flowering phenology of Moss Campion, *Silene acaulis. Fróðskaparrit.* 59:104-112.

**Fosaa A. M**. og William Simonsen (eds). 2011. Lendisnýtsla í Føroyum. Føroya Náttúrugripasavn 41 pp.

**Fosaa, A.M**. 2011. Litingarsortugras *Geranium sylvaticum*. Føroysk frímerki.

Gilles, A., Gunnlaugsson, T., **Mikkelsen, B**., Pike, D., Víkingsson, G. 2011. Harbour porpoise Phocoena phocoena summer abundance in Icelandic and Faroese waters, based on aerial surveys in 2007 and 2010. NAMMCO Scientific Committee Working Group on Abundance Estimates. SC/18/AESP/11.

**Mikkelsen, B., Bloch, D**., Dam. M. and Desportes, G. 2011. Faroe Islands – Progress report on marine mammals 2009-2010. *North Atlantic Marine Mammal Commission*. Annual Report 2010: 413-419.

**Mikkelsen, B**. 2011. Ferðing og støðufesti hjá kópi. *Frøði* 1/2011: 16-21.

**Mikkelsen, B**. 2011. Update of knowledge of grey seals in the Faroe Islands. NAMMCO Scientific Committee Working Group on Coastal Seals. SC/18/CS/22.

Paxton, C.G.M., Gunnlaugsson, T., **Mikkelsen, B.** 2009. Density surface fitting of the T-NASS 2007 Pilot Whale Sightings. NAMMCO Scientific Committee Working Group on Abundance Estimates. SC/18/AESP/10.

Pike, D.G., Desportes, G., Gunnlaugsson, T., **Mikkelsen, B**. and **Bloch, D**. 2011. Estimates of the relative abundance pilot whales (*Globicephala melas*) from North Atlantic Sightings Pike, D., Gunnlaugsson, T., Víkingsson, G., Mikkelsen, B. 2011. Estimates of the abundance of minke whales (*Balaenoptera acutorostrata*) from the T-NASS Icelandic and Faroese ship surveys conducted in 2007. NAMMCO Scientific Committee Working Group on Abundance Estimates. SC/18/AESP/18.

Pike, D., Gunnlaugsson, T., Víkingsson, G., **Mikkelsen, B**. 2011 Estimates of the abundance of sei whales (*Balaenoptera borealis*) from the NASS Icelandic and Faroese ship surveys conducted in 2001 and 2007. NAMMCO Scientific Committee Working Group on Abundance Estimates. SC/18/AESP/07. Surveys, 1987 to 2007. Doc prepared for the AE WG meeting 2011. NAMMCO SC/18/O/05.

Rotander, A., Bavel, B.van, Polder, A., Rigét, F., Auðunsson, G., Gabrielsen, G., Víkingsson, G., **Bloch, D**. and Dam, M. 2011. Polybrominated diophenyl ethers (PBDEs) in marine mammals from Arctic and North Atlantic regions, 1986-2009. *Environmental International* in press; doi: 10.1016/j.envint.2011.07.001. PhD thesis. Örebro University, Sweden: 1-8.

Rotander, A., Kärrman, A., Bavel, B.van, Polder, A., Rigét, F., Auðunsson, G., Víkingsson, G., Gabrielsen, G., **Bloch, D**. and Dam, M. 2011. Increasing levels of long-chain perfluorocarboxylic acids (PFCAs) in Arctic and North Atlantic marine mammals, 1984-2009. *Total Environment*. PhD thesis. Örebro

University, Sweden: 1-29. 2011:564. ISBN 978-92-893-2282-9. © Nordic Council of Ministers, Copenhagen 2011.
**Simonsen, William**, and Herborg Nyholm Debes. 2011. Vátøki, tjørnir og hyljar. Tórshavn: Tórshavnar Kommuna.
**Simonsen, William**, and Herborg Nyholm Debes. 2011. Vegjaðari. Tórshavn: Tórshavnar Kommuna.
**Simonsen, William**, and Herborg Nyholm Debes. 2011. Áir. Tórshavn: Tórshavnar Kommuna.

## Tiltøk og vitjanir

Serfrøðingurin í rottum, og vandanum ið standast av teimum, James Russel var á vitjan í Føroyum. Náttúrugripasavnið luttók í samstarvið við m.a. Tórshavnar Kommunu í samband við hesa vitjan.

## Luttøka á fundum uttanlanda

Norðurlendskt-Baltiskt samstarv um samlingar í Oslo. Anna Maria Fosaa og Janus Hansen luttóku.
Norðurlendskt-Baltiskt samstarv um framsýningar í Helsinki. Palli Askham luttók.

European Vegetation Survey Rom. Anna Maria Fosaa luttók.

ReNo(Restoration of Damaged Ecosystems in the Nordic countries - a Nordic multidiciplinary network), workshop í Íslandi, Leivur Janus Hansen hevði framløgu.

Terrestrial Expert Monitoring Group undir CAFF, workshop í Keypmannahavn. Anna Maria Fosaa luttók.

Vísindafundurin "Marine Ecosystem Monitoring Tool for Sustainable Management of Resources", samskipaður av NAMMCO, var hildin í Oslo 16-17 september. Bjarni Mikkelsen luttók.

NAMMCO vísinda arbeiðsbólkurin um stovnsmetingar av hvali hevði fund í Keypmannahavn 7-11 mars. Bjarni Mikkelsen luttók.

NAMMCO vísinda arbeiðsbólkurin um stein- og láturkóp hevði fund í Keypmannahavn 14-18 mars. Bjarni Mikkelsen luttók.

Vísindanevndin hjá NAMMCO hevði fund við Gjógv 2-5 mai. Bjarni Mikkelsen luttók.

Ársfundurin hjá NAMMCO ráðnum var hildin í Oslo 13-15 september. Bjarni Mikkelsen luttók.

## Umsiting  og ráðgeving

Náttúrugripasavnið kann geva tíðaravmarkaði undantaksloyvir frá Fuglaveiðulógini (Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 26. mars 2002; Kunngerð nr. 120 frá 21. november 1986 um serliga fuglaveiðu; Kunngerð nr. 60 frá 16. mai 1986 um ræning av lomvigaeggum.) til vísindalig og alment gagnlig endamál. Í 2011 vórðu 2 loyvi útskrivað.

Dorete Bloch er ráðgevi hjá Vága Floghavn í samband við fuglalívið á staðnum.

## *Havlívfrøðilig Royndarstøð*

Havlívfrøðiliga Royndarstøðin, sum áðrenn 2007 var ein verkætlan undir djórasavninum hjá Náttúrugripasavninum, varð í 2007 skipað sum ein sjálvstøðugur stovnur. Í sambandi við skipan av Søvnum Landsins verður virksemið hjá Havlívfrøðiligu Royndarstøðini skipað sum ein liður í virkseminum hjá Náttúrugripasavninum.

Meginuppgávan hjá Havlívfrøðiligu Royndarstøðini var í 2011 at gera umhvørviskanningar av árini frá m.a. alibrúkum á sjónum og hava museala innsavning í sambandi við hetta. Tann parturin av virkseminum, sum umfatar tænastuveiting til vinnu, er inntøkufíggjaður.

Gongdin seinastu árini hevur verið at støðugt fleiri uppgávur verða loystar, og at tørvurin er vaksandi samsvarandi støðugt øktum mynduleikakrøvum. Flestu uppgávur eru innan alivinnu, men uppgávur hava eisini verið fyri fiskavirkir, kommunalar havnir, vatnorkuútbygging, brennistøðir og oljufeløg. Fýra lívfrøðingar starvaðust á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í 2011. Í flestu førum verður frágreiðing gjørd og niðanfyri er einn samandráttur seinastu árini

**Frágreiðingar skrivaðar í tíðarskeiðnum 1998-2011**

| | Aling | Fiskavirkir | Vatnorka | Oljuleiting | Fjarðakanningar | Íalt | Síður |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1998 | 8 | | | | 1 | 8 | 162 |
| 1999 | 12 | | | | 1 | 12 | 256 |
| 2000 | 27 | | 1 | | 1 | 28 | 581 |
| 2001 | 15 | | 1 | | 1 | 16 | 192 |
| 2002 | 26 | | 1 | | 1 | 28 | 546 |
| 2003 | 26 | 3 | | | 2 | 30 | 728 |
| 2004 | 31 | 9 | 1 | | 1 | 42 | 584 |
| 2005 | 32 | 5 | 1 | | 1 | 39 | 831 |
| 2006 | 32 | 5 | 1 | 1 | 1 | 40 | 1053 |
| 2007 | 36 | 5 | 1 | | 1 | 43 | 732 |
| 2008 | 34 | 7 | 1 | | 1 | 43 | 710 |
| 2009 | 23 | 6 | 1 | | 1 | 31 | 576 |
| 2010 | 32 | 5 | 1 | | 1 | 39 | 847 |
| 2011 | 34 | 4 | | | | 38 | 521 |
| | 368 | 49 | 10 | 1 | 9 | 399 | 8319 |